# Jólabygdin tendrað



**Æðuvík, sum eisini er kend sum jólabygdin varð í gjár tendrað um meira jólaprýdd enn nakrantíð áður**

JÓLAHUGNI
*Bergur Johannesen*
*Myndir: Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Í Æðuvík er tað vorðið siðvenja har at prýða húsini við ljósum og øðrum uppundir jólini. Og hvørt ár er nøgdin av perum og ljósum vaksin – og 2008 er einki undantak.

Nógv fólk vóru savnað til jólahugnan. Eftir hugnaligan jólatónleik bar Helena Dam á Neystabø fram talu, um jólini, ið sameindu fólk í gleði bæði so og so. Hon rósti Æðuvík fyri teirra ídni ár eftir ár, ið av álvara letur jólahugnan koma inn um gátt hjá teimum, ið vitja bygdina.

Afturvið fleiri hugnaligum tónum varð boðið til holukøkur og gløgg, ið var sera kærkomið í kuldanum. Jólamaðurin vitjaði eisini, hóast tað desember mánaðin ikki var byrjaður, og børnini fingu góðgæti. Nógvir gestirnir nýttu høvið at fara sær ein túr í skrýddu bygdini.







*Bygdin var øll sum hon er nógv og væl prýdd. Heildin er tó fagrasta sjónin*



*Hornorkrestrið undirhelt við vøkrum og hugnaligum jólatónum, áðrenn og eftir taluna hjá landstýriskvinnuni í mentamálum*


IÐFLOKKURIN



Eg vil hervið takka veljarunum í Tórshavnar Kommunu fyri álitið, ið mær varð víst við 144 atkvøðum til Býráðsvalið 2008. Vit rukku tað ikki hesu ferð, men vónandi næstu ferð... ☺

*Vinarliga*
**Charlotta á Váli Olsen**
**Miðflokkurin**



